# Persónupplýsingarpolitikkur fyri borgarar (Privatlívspolitikkur)

**Skjalaútgáva 2.0**

| | |
|---|---|
| **Gjørdur av**: Tórshavnar Kommunu | **Samtyktur av**: Tórshavnar Býráð |
| **Samtykt tann**: 15/12/2022 | **Seinast tillagaður**: 12/12/2024 |
| **Málbólkur**: Politikkurin verður lagdur út á torshavn.fo, sum kunning til borgaran. Øll starvsfólk í Tórshavnar Kommunu skulu kenna hendan politikk. | |
| **Lógargrundarlag**: Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum | |

## Viðgerð av tínum upplýsingum

Tórshavnar Kommuna tekur dátutrygd og verju av tínum persónupplýsingum í størsta álvara. Ikki einans við at tryggja okkara kt-skipanir, men eisini við, at okkara starvsfólk í dagliga yrki sínum eru kunnaði og tilvitaði um, hvussu vit handfara persónupplýsingar sambært galdandi lóggávu. Í Tórshavnar Kommunu viðgera vit tær persónupplýsingar, sum eru neyðugar fyri at loysa okkara uppgávur.

Tórshavnar Kommuna er dátuábyrgdari. Tað er okkara ábyrgd, at tú trygt kanst lata tínar persónupplýsingar til okkum.

Endamálið við kunningini er, at tú, sum borgari, fært svar uppá spurningar viðvíkjandi dátutrygd í Tórshavnar Kommunu, og tíni rættindi í mun til okkara viðgerð av persónupplýsingum.

Allir spurningar og viðurskifti viðvíkjandi persónupplýsingum og dátutrygd ella møgulig trygdarbrot skulu stílast til Dátuverndarfólkið (DPO) í Tórshavnar Kommunu. Alt samskifti skal vera skrivligt og viðmerkjast "**Dátuvernd**".

Tú kanst skriva til dátuverndarfólkið við telduposti til DPO@torshavn.fo.

Tú kanst eisini skriva bræv til:

Tórshavnar Kommuna
**Dátuverndarfólk**
Vaglið
Postsmoga 32
110 Tórshavn

Tá tú skrivar til okkara mæla vit til, at tú nýtir teldupost, av tí at hetta er skjótari og lættari hjá okkum at avgreiða.

**Hvat er endamálið og heimildin fyri tykkara viðgerð av mínum persónupplýsingum?**
Tórshavnar Kommuna viðger persónupplýsingar um teg í samband við tær uppgávur, ið vit sum kommuna skulu loysa. Tað kann vera ein tænasta, sum tú hevur rætt til at fáa á t.d. Snarskivuni, Heilsu- og umsorganarøkinum, Tekniska økinum, Dagstovnaøkinum, Trivnaðarøkinum, Tórshavnar Havn, Kvøldskúlanum ella á øðrum økjum. Tað kann eisini vera, at vit hava eina rættarliga skyldu at viðgera tínar persónupplýsingar, ella vit hava gjørt eina avtalu við teg, sum inniber, at vit hava tørv á tínum upplýsingum.

Grundarlagið undir heimildini er sostatt, at viðgerðin er partur av okkara myndugleikaútinnan ella um TK hevur eina rættliga skyldu at viðgera tínar persónupplýsingar. Tað kann eisini vera, at vit hava umbiðið og fingið eitt samtykki frá tær til viðgerð av tínum upplýsingum.

Hvørjar upplýsingar vit hava tørv á, veldst um, hvat endamálið er við tí myndugleikauppgávu, sum vit skulu loysa. Vit innsavna einans upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at vit fáa viðgjørt títt mál.

Tað er sostatt § 8, stk. 1, nr. 1, 3 ella 5, umframt § 12, stk. 1, nr. 1, 2, 3 ella 7 í Dátuverndarlógini, sum er lógliga viðgerðarheimildin fyri okkara innsavnan og viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Um vit innsavna ella seinni viðgera tínar upplýsingar til hagfrøðilig endamál, verður tað gjørt innanfyri karmarnar av § 7, stk. 3, í Dátuverndarlógini.

Dátuverndarlógina finnur tú her.

**Hvørjar persónupplýsingar hava vit tørv á?**
Slagið av persónupplýsingum vit viðgera avhongur av endamálinum við viðgerðini.

Vit kunnu viðgera fylgjandi bólkar av persónupplýsingum, tá tað er neyðugt fyri at loysa okkara uppgávur:

| Bólkur | Lýsing |
|---|---|
| Vanligar, ikki trúnaðar persónupplýsingar | Upplýsingar eru td. navn, bústaður, teldupost-adressa, telefonnr., matr. nr. vm. |
| Vanligar, trúnaðar persónupplýsingar | Upplýsingar um td. sosial viðurskifti, fíggjarlig viðurskifti, familju viðurskifti, umsóknir og onnur mál, ptal |
| Viðkvæmar persónupplýsingar | Upplýsingar um:<br>• Húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna<br>• Politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring<br>• Yrkisfelagsligt tilknýti<br>• Heilsuupplýsingar<br>• Kynslig viðurskifti<br>• Munandi sosialar trupulleikar<br>• Onnur heilt privat viðurskifti |

Í nógvum førum í samband við mál og uppgávur, hava vit tørv á, at brúka títt ptal til eintýdda eyðmerking. Tórshavnar Kommuna kann, sum almennur myndugleiki, nýta títt ptal til eintýdda eyðmerking, sum ásett í § 16 í dátuverndarlógini.

Tú hevur altíð rætt til at vita, hvørjar upplýsingar vit viðgera um teg.

**Hvaðani innsavna tit persónupplýsingar um meg?**
Vit innsavna tínar persónupplýsingar á ymiskan hátt og innan ymisk økir.

Tá tú skrivar til okkara á torshavn@torshavn.fo, verða boðini send víðari til rætta viðkomandi, sum boðini eru ætlað til. Teldubrøv og samskifti frá borgarum, ið krevja málsviðgerð, verða øll skrásett í journalskipan hjá TK.

Í flestu førum biðja vit um upplýsingar beinleiðis frá tær, tá tú vendir tær til okkara, ella brúkar eina sjálvvirkandi loysn td. tá tú søkir um ella meldar teg til eina tænastu ella virksemi í kommununi umvegis heimasíðu ella vangan.

Niðanfyri er vegleiðandi yvirlit yvir fyrisitingina í Tórshavnar Kommunu og tær tænastur, ið tær ymsu fyrisitingarnar bjóða og umsita. Í hesum sambandi verða oftast persónupplýsingar innsavnaðar og viðgjørdar.

**Tórshavnar Kommuna – yvirlit yvir fyrisiting**

| Fyrisiting | Deildir | Tænastur |
|---|---|---|
| **Kommunustjóri** | Stjórnarskrivstovan | Innanhýsis løgfrøðilig ráðgeving og samskifti. Hugskotið veitir íverksetarum fysiskar og ráðgevandi karmar. |
| | Tórshavnar Havn | Maritimar tænastur og veitingar fyri havnir í Tórshavnar Kommunu |
| **Heilsu- og umsorganarfyrisiting** | H&U stápur | Fyrisiting og málsviðger innan heilsu- og umsorganarøkið |
| | H&U tænastur | Bústovnar, eldrasambýli, Heilsuhúsið, heimarøkt heimasjúkrarøkt, umlætting og endurvenjing, virkis- og venjingarstovur |
| **Miðfyrisiting** | Fíggjardeild | Fíggjarætlan, roknskapur, høvuðsbókhald og kreditor- og debitorbókhald |
| | Kt-deild | Kt-rakstur og kt-trygd |
| | Miðfyrisitingarstápur | Dátaverndarfólk, dátuvernd, tryggingarviðurskifti, útboðspolitikkur |
| | Snarskivan | Borgaratænasta, journal, móttøka og samskifti |
| | Starvsfólkadeild | Starvsfólkaumsóknir og starvsfólkaviðurskifti |
| **Tekniska fyrisiting** | Byggimálsdeild | Umsóknir og málsviðgerð grundstykkir og byggiloyvi |
| | Býarskipanardeild | Býarskipan, verkætlanir |
| | Bygningsdeildin | Verkætlanir, húsaumsiting og bygningsrakstur |
| | Rakstrarstøðin | Reingerð og kavarudding av vegum |

| | | |
|---|---|---|
| | Tekniska deild | Verkætlanir og málsviðgerð innan bussleið, kloakkir, rakstrarstøðin, vatn- og gøtuljós, vegakervið, verkstaður |
| | Umhvørvisdeild | Brennistøð, endurnýtsla, umhvørvispolitikkur |
| | Sløkkiliðið | Sløkkiliðs- og bjargingarátøk |
| **Trivnaðarfyrisiting** | Barna- og ungdómsdeild | Dagstovnaøkið og frítíðarskúlar umframt ungdómsklubbar/hús, Margarinfabrikkin, Ung í arbeiðið vm. býttar í eindirnar B.A.R.N og námsfrøðiliga ráðgevingin |
| | Barnatannrøktin | Barnatannrøkt til børn frá 0-18 ár í Tórshavnar Kommunu og Sandoynni |
| | Integratión | Integratiónsverkætlanir og samskipan |
| | Mentamáladeild | Býarbókasavnið, kommunalir fólkaskúlar, ítróttaranlegg, kvøldskúli, mentanarhølir í miðbýnum, musikkskúli, svimjihøll |
| | Sosiala deild | Barnaverndarmál, barnaverndartænastur, málsviðgerð |

Ynskir tú at vita meira um tær einstøku tænasturnar kanst tú lesa meira á www.torshavn.fo
Í nógvum førum er neyðugt hjá Tórshavnar Kommunu at innheinta upplýsingar um teg, t.d. um vit skulu viðgera eitt mál. Tað kunnu vera upplýsingar frá øðrum almennum myndugleikum ella felagsskráir t.d. TAKS ella fólkayvirlitið.

Í øðrum førum fáa vit upplýsingar um teg frá øðrum. Tú kanst t.d. vera sonevnt "eykafólk" í einum máli, um tú ert avvarðandi hjá tí persóni málið snýr seg um, ella tú kanst vera partur í einum máli, sum onkur annar hevur lagt fyri kommununa.

Tú hevur altíð rætt til at vita, hvaðani og hvørjar upplýsingar vit innsavna um teg.

**Vakmyndatól**
Fyri at verja ognir og virðir hjá Tórshavnar Kommunu móti kriminellum handlingum, økja um trygdina fyri borgarum og starvsfólkum í TK og skapa møguleika fyri kanningum av kriminellum handlingum, eru vakmyndatól set upp við ávísar stovnar og anlegg hjá Tórshavnar kommunu.

Á øllum støðum, har vakmyndatól eru sett upp, verður skeltað soleiðis, at vakmyndayvirvaking er sjónlig. Uppseting og umsiting av vakmyndatólum fylgir mannagongd fyri vakmyndatól. Tað eru einans avmarkað tal av starvsfólkum, ið hava atgongd til upptøkurnar, og upptøkurnar verða einans goymdar sambært galdandi lóggávu, og so leingi tað er neyðugt í mun til endamálið annars. Upptøkur kunnu vera latnar Politinum, um politiið hevur brúk fyri teimum í samband við eitt politimál.

**Samtykki**
Tá persónupplýsingar eru neyðugar fyri, at Kommunan kann loysa sínar uppgávur, skulu vit ikki hava samtykki. Um vit nýta myndir til annað, enn tað, sum fer út um eina myndugleika uppgávu, kunnu vit bara brúka myndir, um vit hava samtykki.

Um TK td. ynskir at brúka myndir av borgarum til ein bókling ella líknandi, biðja vit um samtykki frá borgaranum áðrenn. Samtykki verða umbiðin í tráð við ásetingar í Dátuverndarlógini um samtykki. TK hevur mannagongdir fyri handfaring av myndatøku og deiling av myndum, sum øll starvsfólk skulu fylgja.

**Letur TK mínar upplýsingar víðari til triðjapart?**
Í summum førum lata vit tínar persónupplýsingar víðari. Hetta verður bert gjørt um tað er neyðugt fyri at loysa eina uppgávu, og um tað er lógligt. Tað kann vera til aðrar almennar myndugleikar, aðrar kommunur, ráðgevar, grannskoðarar, advokatar v.m.

Í summum førum mugu vit, sambært fyrisitingarlógini ella lóg um alment innlit, víðarilata upplýsingar um teg.

Eisini nýta vit í summum førum dátuviðgerar, sum hjálpa okkum við at viðgera tínar upplýsingar á góðan og tryggan hátt. Tað kann m.a. vera goymsla (hýsing) av persóndátum, ella um vit fáa hjálp frá uttanhýsis ráðgevum til málsviðgerð.

Tórshavnar Kommuna ger dátuviðgeraravtalur við veitarar, sum goyma dátur fyri TK. Avtalurnar skulu tryggja, at varðveitsla og viðgerð av dátum bert fer fram sambært boðum frá TK, og lúka hóskandi og somu trygdarkrøv, sum tá TK goymir og viðger dátur. Er dátuviðgeraravtala ikki neyðug, verður trúnaðaravtala gjørd við ráðgevar ella viðkomandi tænastuveitarar.

**Flyta tit mínar upplýsingar til triðjalond?**
Tórshavnar Kommunu nýtir ikki, sum útgangsstøðið, veitarar ella dátuviðgerar, sum halda til uttan fyri ES/EBS (triðjalond). Hetta kann tó koma fyri í einstøkum førum.

Um so er, at vit flyta tínar upplýsingar uttanfyri ES/EBS, fara vit altíð at tryggja okkum, nøktandi heimildargrundarlag fyri flutninginum – hetta merkir, at vit tryggja okkum at verndarstøði av tínum upplýsingum er nøktandi.

**Hvussu leingi goyma tit mínar upplýsingar?**
Flestu upplýsingar, ið TK hevur, skulu goymast fyri, at vit kunnu skjalfesta okkara málsviðgerð. Hvussu leingi vit goyma tínar persónupplýsingar veldst um, hvussu leingi vit hava tørv á teimum til at røkja okkara myndugleikauppgávur.

Vanliga verða tínar persónupplýsingar goymdar líka so leingi, sum tað málið tær eru partur av. Tá ið vit ikki hava tørv á upplýsingunum longur, verður støða tikin til varðveitslu/striking av tínum upplýsingum. Treytað av skjalasavnslógini, skulu upplýsingarnar, sum eru mettar at vera savnindi flytast Tjóðskjalasavninum.

Er talan ikki um savnindi, kann strikifreistin vera longri ella styttri:
- Longri strikifreist kann vera lógarkrav, um tað er neyðugt fyri at loysa myndugleikauppgávuna
- Styttri strikifreist kann vera í samband við td. vakmyndatól, har upplýsingar skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna sambært galdandi lóggávu fyri vakmyndatól.

**Hvussu goyma vit upplýsingar?**
Í Tórshavnar Kommunu menna vit áhaldandi, hvussu vit á besta hátt tryggja, at tínar upplýsingar eru goymdar trygt. Um upplýsingarnar eru elektroniskar verða tær goymdar í tryggari skipan. Hetta er galdandi bæði fyri upplýsingar vit sjálvi savna inn, og fyri upplýsingar vit fáa frá tær í samband við eitt mál.

Í deildum har málsviðgerðin ikki er elektronisk, tryggja vit, at deildirnar hava møguleika fyri at steingja upplýsingarnar inni, og hava eina trygga mannagongd fyri, at bert viðkomandi starvsfólk hava atgongd til upplýsingarnar.

**Hvørji rættindi havi eg, tá ið tit viðgera mínar persónupplýsingar?**
Tú hevur sambært Dátuverndarlógini eina røð av rættindum í mun til okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum:

**Rætt til innlit**
Tú hevur rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar kommunan goymir og viðger um teg.

Fyri at vit á besta hátt kunna viðgera tína umbøn, heita vit á teg, í samband við eina umbøn, at greiða okkum frá, hvat øki í kommununi tú hevur havt samband við, t.d. heimahjálp, dagstovnur, skúli, kvøldskúli, tekniska økið v.m. So er lættari hjá okkum at finna upplýsingarnar fram. Tú kanst nýta yvirlitið yvir fyrisitingina omanfyri til vegleiðing.

**Rætt til at afturkalla eitt samtykki**
Um okkara viðger av tínum persónupplýsingum er grundað á samtykki frá tær, hevur tú altíð rætt til at afturkalla títt samtykki. Tá ið tú afturkallar títt samtykki, ávirkar tað ikki viðgerðina, sum er farin fram, grundað á samtykki, men framatrættað steðga vit viðgerðini av tínum persónupplýsingum, sum varð grundað á samtykki.

Gev gætur, at um tú afturkallar eitt samtykki, eru vit møguliga ikki før fyri at veita tær eina ávísa tænastu.

**Rætt til rætting**
Tú hevur rætt til at fáa rættað persónupplýsingar, sum eru rangar ella villeiðandi soleiðis, at vit ikki viðgera upplýsingar um teg, sum eru skeivar ella ófullfíggjaðar.

**Rætt til striking**
Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa strikað persónupplýsingar, sum vit hava um teg, áðrenn ásetta, vanliga strikingin fer fram. Ræ, tturin er ikki treytaleysur, tá ávísir upplýsingar ikki mugu strikast grundað á aðra lóggávu, ella um avtala og ávíst endamál gevur kommununi rætt til at varðveita og viðgera persónupplýsingarnar.

**Rætt til viðgerðaravmarking (steingjan) av upplýsingum**
Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Td. um upplýsingarnar eru rangar, villleiðandi ella viðgjørdar móti lóg ella ásetingum, heimilaðum í lóg, inntil upplýsingarnar aftur eru fingnar í rætt lag. Sí eisini niðanfyri um rætt til mótmæli.

Hetta merkir, at um treytirnar til viðgerðaravmarking eru uppfyltar, at vit einans kunnu viðgera tínar persónupplýsingar í serligum førum. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir bert viðgera tínar upplýsingar, undantikið varðveitslu, við samtykki, ella við tí endamálið, at rættarkrav kann fastleggjast, gerast galdandi ella verjast, ella fyri at verja ein persón ella taka atlit til umráðandi samfelagsáhugamál.

**Rætt til rætting, striking ella viðgerðaravmarking (steingjan) av upplýsingum, sum eru latnar víðari**
Í summum førum letur TK persóndátur víðari. Um skrásetti nýtir sín rætt til at biðja um rætting, striking ella steingjan av upplýsingum, skal TK geva øllum móttakarum, sum persónupplýsingarnar eru latnar víðari til boð um allar rættingar, strikingar ella viðgerðaravmarkingar sambært § 30 í DVL um fráboðanarskyldu dátuábyrgdarans. Undantak kann verða um hetta vísir seg at verða ógjørligt ella órímiliga torført.

**Rætt til mótmæli**
Tú kanst átala, at persónupplýsingar um teg verða viðgjørdar. Um átalan má metast heimilað, skulu persónupplýsingarnar um teg ikki viðgerast. Tó kunnu upplýsingarnar møguliga framvegis nýtast til, at viðgera møgulig onnur lóglig endamál.

**Kann eg kæra?**
Tú hevur altíð møguleika at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/-ur við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Tú finnur samskiftisupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á www.dat.fo

**Leinki**
Á heimasíðuni hjá føroyska Dátueftirlitinum dat.fo finnur tú fleiri upplýsingar um dátutrygd, verju av persónupplýsingum og um tíni rættindi.

***Allar aktivar heimasíður hjá Tórshavnar Kommunu skulu hava sniðgjørdan persónupplýsingarpolitikk, sum fevnir um innsavnan, viðgerðir og varðveitslu/striking av dátum vm. fyri akkurát teirra øki, og eitt leinki til Persónupplýsingarpolitikk fyri borgarar hjá Tórshavnar Kommunu.***

**Tillaging og eftirmeting**

Politikkur skal eftirmetast eftir tørvi og í minsta lagi 2. hvørt ár. Býráðið samtykkir politikkin.

Seinasta samtyktur í Býráðnum 15/12/22.